## Svøríki missir Zlatan

Tá Zlatan Ibrahimovich, Olof Mellberg og Christian Wilhelmsson ikki hildu seg til ásettu reglurnar undan landsdystinum hjá Svøríki móti Liktenstein, gjørdi venjarin av, at teir skuldu úr hópinum til tann dystin. Mellberg og Wilhelmsson góðtóku revsingina, og síðani hava teir aftur verið á liðnum, men við Zlatan er øðrvís. Í farnu viku slerdi hann eisini fast, at hann ikki ætlar sær á landsliðið aftur.
– Eg havi í løtuni ongar ætlanir um at spæla á landsliðnum aftur. Hvør maður má taka sína egnu avgerð, og eg havi tikið mína, sigur Zlatan, sum 42 ferðir hevur spælt á svenska landsliðnum.



## Reytt kort til Beckham

David Beckham var annan dystin á rað at síggja hjá Real Madrid, tá teir spældu málleysan javnleik móti Betis um vikuskiftið. Hesa ferð gekst tó ikki heilt so væl hjá Beckham, sum móti dystarenda varð rikin av vølli fyri hevnisøku móti Jose Isodoro. Javnleikurin ber við sær, at Realm Madrid enn er á fjórða plássinum. Fýra stig aftan fyri Barcelonog Sevilla.

Stjørnan-Neistin 33-21 (20-7):

# Neistin bukaðar upp á pláss

**Stjørnan staðfesti við sjey-tumma seymið favoritt-heitið í bestu kvinnudeildini, tá næsti avbjóðarin varð sendur heim við sonnum avsmurningi**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skal Neistin taka nakað positivt við sær frá útidystinum móti Stjørnuni sunnudagin, so má tað vera fyrstu tíggju minuttirnir. Her royndu gestirnir veruliga at taka steypavinnararnar á bóli, og í sínum lag tóktust tær á heimaliðnum at hava nakrar sálarligar timburmenn eftir steypasigurin. Eitt fyribrigdi, sum ofta er sjónligt, tá næsti dysturin eftir ein stóran sigur skal spælast.

Neistin kom hesa fyrstu løtuna upp á eina lítla leiðslu, men eftir at Henrik Gerster hevði rópt sínar spælarar út, so hann fekk geylað tær ígongd, skrædnaði dysturin fullkomuliga.

Bláu gestirnir vóru nú bara at rokna sum statistar í einum uppvísningsdysti hjá Stjørnuni, og ein fyri og annar eftir skolaðu bóltarnir í Neista-málið.

Hvørki tær bláu ella venjari teirra vistu síni livandi ráð, og hóast time-out varð tikið, so eydnaðist ikki at steðga eyðmýkingini.

### Risa-favorittar

Við 20-7 í steðginum var eingin sum helst spenningur at hóma seinna umfarið, og tær á heimaliðnum høvdu tí ongan tørv á framhaldandi at koyra eins nógv á.

Men eftir stendur, at Stjørnan í dag er størri FM-favorittur, enn tær nakran tíð hava verið. Tað kann væl vera, at fortreytirnar hjá Neistanum ikki vóru av teimum bestu, nú tær spældu leygardag í Vági og sunnudag í Klaksvík. Og tað kann væl vera, at Stjørnan við einum bleytum dysti leygardagin í nógv størri mun kundi goyma kreftirnar til sunudagin.

Men har er eingin sum helst ivi um, at sigurin var so ruddiliga uppiborin, og sálarliga hevur hesin helst eisini givið Neistanum eitt knekk av slíkum slag, sum kann vera sera tungt at vinna á.



**FAKTA**

**Stjørnan-Neistin 33-21 (20-7)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Alina Olaru 7(3), Una Olsen 6, Simona Petersen 6, Joan Midjord Djordjevic 5, Anna Kristina Samson 3, Louisa Andreasen 3, Bára Skaale Klakstein 3
**Neistin:** Ása á Neystabø 6, Unn Kragesteen 4(1), Annika Thomsen 4, Rakul Augustinussen 2, Maria Dahl 2, Nicoleta Radu Hansen 1, Katja Eigemann 1(1), Elin Stakksund 1
**Brotskøst:** Stjørnan 4, Neisitn 7
**Útvísingar:** Stjørnan 5, Neistin 1
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen

# Arsenal og United snávaðu – Chelsea heldur stílin

**Chelsea og Tottenham fóru strúkandi víðari til fjórðingsfinalurnar í ensku steypakappingini, saman við Manchester City, Plymouth og Watford. Manchester United, Arsenal og Middlesbrough mugu øll út í umdyst**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Av teimum stóru liðunum hevði Chelsea lættastu uppgávuna, tá teir á Stamford Bridge tóku í móti Norwich, sum jú hevði sent Claus Bech Jørgensen og Blackpool úr kappingini frammanundan.

Chelsea læt ongan iva vera av nøkrum slag. Teir vunnu ruddiliga 4-0 við einum sjálvmáli, og so einum máli í part frá Wright-Phillips, Drogba, Essien og Shevchenko.

Tottenham fór somuleiðis sendandi víðari til fjórðingsfinalurnar. Málskjúttarnir vóru Keane og Berbatov. Teir staðfestu sínar dygdir sum áleyparar og gjørdu tvey mál hvør, men Montella í álopinum hjá Fulham eisini gjørdi vart við seg, men kanska heldur keðiliga, tá hann sá reytt fyri at langa albogan út eftir Keane móti dystarenda.

Manchester City, Watford og Plymouth gjørdu Chelsea og Tottenham kynstrið eftir, vunnu sínar dystir og komu somuleiðis víðari í steypakappingini.

### Reyð vónbrot

Verri var hjá Manchester United, Arsenal og Middlesbrough.

Um vit byrja við síðst nevnda liði, so komu teir fram um sum ætlað, tá vinstri vongverjin, Arca, skoraði fyri Middlesbrough, tá hálvur tími var farin. West Bromwich javnaðu stutt fyri hálvleik, men beint sum seinni hálvleikur byrjaði var Middlesbrough aftur á odda, tá Yakubu setti eitt brotsspark í netið. West Bromwich javnaði, tá góður hálvur tími restaði, men fleiri mál komu so ikki í dystinum, sum endaði 2-2.

Manchester United fekk somuleiðis javnt í sínum dysti móti Reading, sum endaði 1-1. Michael Carrick skoraði fyri vertirnar á Old Trafford, tá dysturin var hálvrunnin. Manchester United sá eisini út at hava tamarhald á støðuni, men brádliga stóð á jøvnum, tá íslendski Gunnarsson hevði stútað eitt hornaspark í netið.

Tá restaðu góðir 20 minuttir, og í eini roynd at vinna dystin, setti Fergusson stutt eftir bæði Scholes og Larsson á vøllin. Hetta fekk tó onga ávirkan á úrslitið, og harvið endaði tað við javnleiki.

Eisini Arsenal mátti taka til takkar við javnleiki. Teir raktu ikki málið, tá Blackburn vitjaði á Emirates Stadium. Tað gjørdi Blackburn heldur ikki, og harvið noyðast teir, eins og Manchester United og Reading og Middlesbrough og West Bromwich.

KÍF-Neistin 21-28 (6-14):

# Neistin aftur í meistarastríðið

**Spenningur kom ongantíð í dystin millum KÍF og Neistan í Atlantic Airways kappingini. Neistin avgjørdi alt í fyrra hálvleiki**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dysturin í Kollafirði var ikki nógvar minuttir gamal, fyrrenn hann í roynd og veru var avgjørdur. Neistin legði fyri sum eitt satt ódnarveður, og teir lótu slett ikki kollfirðingarnar fáa fótin fyri seg fyrstu longu løtuna. Neistin skoraði eitt mál fyri og annað eftir, og brádliga vísti talvan 5-0 til bláu gestirnar úr Havnini. Tá vóru fleiri enn 10 minuttir farnir, og enn var KÍF slett ikki komið á talvuna.

### 13 minuttir uttan mál

Heili 13 minuttir skuldu til, áðrenn KÍF fekk sítt fyrsta mál, men hetta steðgaði ikki Neistanum. Teir koyrdu á við somu megi, og tá 20 minuttir vóru farnir, høvdu teir økt enn meir um leiðsluna, soleiðis at støðan nú var 10-3 til gestirnar.

Samstundis sum Neistin spældi væl, so spældi KÍF ótrúliga illa, og einasti leikarin, sum av øllum alvi royndi at steðga Neistanum, var Óla Kristjan Djurhuus í málinum. Hann hevði fleiri stórar bjargingar í fyrra hálvleiki, men synd er at siga, at hann fekk nógva hjálp frá verjuni.

Í hinum endanum stóð Jacob Larsen eisini ein fram úr góðan fyrra hálvleik. Hann tók rættiliga broddin av stórskjúttunum hjá KÍF, og hann var ein góður maður fyri Neistan henda dagin.

### Ongan tíð í vanda

Eftir steðgin var KÍF munandi betyri við. Ikki minst var Damir Oros nú um at koma fyri seg, eftir at hann einki mál fekk fyrstu 30 minutirnar.

Nóg mikið til at skapa spenning, var hetta tó ongantíð. Neistin hevði snøgt sagt fleiri gear enn vertirnir, sum – tá tað stóð best til – minkaðu munin í fimm mál.

Móti endanum fekk Neistin aftur økt nakað um munin, og tað var neyvan nakar, sum mótmælti uppiborna sigrinum. Neistin setti seg á dystin frá fyrsta bríksli, og nú hava teir veruliga bart seg innaftur í heiðursmerkjastríðið.

**FAKTA**

**KÍF-Neistin 21-28 (6-14)**
**Málskjúttar**
**KÍF:** Damir Oros 8, Daniel Rapa 4 (2), Ingi Johannesen 3, Niklas Reginsson 2, Gert Hansen 2, Rógvi Weyhe 1, Eddie Joensen 1
**Neistin:** Roar Dalsgarð 8, Blagoje Buha 7, Tróndur Kragesten 5 (1), Jugoslav Djumic 3, Áki Mørk 3, Dann Thorleifsson 1, Carl Herup Olsen 1
**Brotskøst:** KÍF 2, Neistin 2
**Útvísingar:** KÍF 5, Neistin 1
**Dómarar:** Andreas Hansen & Eyðun Samuelsen